# Sjúkrahúsini betala fólki løn fyri at trilla tumlar

**– Heilsuverkið er eitt botnleyst hol og tí er tað okkara fremsta skylda at fáa so nógv burturúr játtanini sum gjørligt og tað ber til at fáa meiri burturúr, enn nú, sigur Jóhan Petur Davidsen, leiðandi yvirlækni á Landssjúkrahúsinum**

HEILSUVERKIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Sjúkrahúsini hava ikki neyðturvuliga brúk fyri meiri pengum. Hinvegin hava vit brúk fyri, at politikarar vísa ábyrgd og ikki bara hugsa í lokalpatriotismu og í atkvøðum, tá avgerðir verða tiknar, sigur Jóhan Petur Davidsen, leiðandi yvirlækni á Landssjúkrahúsinum*

– Tað er okkara skylda at brúka játtanina til heilsuverkið so effektivt sum gjørligt. Og tað ber væl til at rationalisera nógv meiri enn tað er í dag.

Tað heldur Jóhan Petur Davidsen, leiðandi yvirlækni á skurðdeildini á Landssjúkrahúsinum.

Tað, sum eftir er av hesum árinum, eru ymsar broytingar verða settar í verk á Landssjúkrahúsinum fyri at játtanin skal haldast. Summi kalla hesar broytingar umleggingar, onnur kalla tær sparingar. Ì hvussu so er hevur hetta enn einaferð reist spurningin um játtanina til Heilsiverkið, samstundis sum ymsir sjúklinga - einstaklingar og felagsskapir funnist hvassliga at teimum tiltøkum, sum nú verða sett í verk, tí tey siga, at tað fer at gera tænastuna til sjúklingin verri.

Men mitt í øllum kemur so leiðandi yvirlæknin á Landssjúkrahúsinum og sigur, at tað ber væl til at seta enn fleiri tiltøk í verk fyri at fáa játtanina til heilsuverkið at røkka longri.

– Heilsuverkið er eitt botnleyst hol, tí tað kunnu altíð brúkast pengar til ymisk endamál. Júst tí er tað okkara fremsta skylda at brúka játtanina so effektivt sum gjørligt.

Og tað gera vit ikki í løtuni, heldur hann.

## Fáa ólki fyri at trilla tumlar

Sostatt heldur Jóhan Petur Davidsen, at tað ber væl til at rationalisera heilsuverkið enn meiri.

– Mær dámar ikki at kalla nógv av teimum tiltøkum, sum vera sett í verk á Landssjúkrahúsinum, fyri sparingar. Talan er heldur um rationaliseringar, sum hava til endamáls at gagnnýta játtanina sum best.

*Men er tað so, at heilsuverkið brúkar pening óneyðugt?*

– Eg haldi í hvussu so er, at vit eiga at fáa væl meiri burturúr játtanini til Heilsuverkið. Hann heldur, at serliga eigur Heilsuverkið at ansa eftir, at ikki ov nógvur peningur verður brúktur at at rinda fyri ymsar tilbúgvingar, har starvsfólk sita og trilla tumlar og sjálvdan verða aktiverað, fyri síðani at avspáka um dagin, tá ið tað annars er brúk fyri teimum.

Hann sigur, at tað er vanligt á sjúkrahúsunum, at nógv fólk sita til reiðar í eini tilbúgving um kvøldarnar og um næturnar fyri at vera til reiðar, skuldi okkurt hent.

Hann heldur, at serliga er hetta dýrt á teimum smáu sjúkrahúsunum, tí har sita fleiri fakbólkar til reiðar í eini tilbúgving, fyri tað allarmesta uttan at gera nakað sum helst.

– Spurningurin er, hvussu ofta tað er brúk fyri hesi tilbúgvingini, serliga á teimum smáu sjúkrahúsunum.

Hann sigur, at sostatt betalir Heilsuverkið nógvar lønir til fólk, sum bara sita og bíða uttan at vit fáa nakra heilsubót burturúr tí. Jóhan Petur Davidsen sigur, at tær umleggingar, sum nýliga er gjørdar á føðideildini á Landssjúkrahúsinum, eru dømi um hetta.

– Har sótu ljósmøður á vakt um kvøldarnar og um næturnar fyri at vera til reiðar, skuldi ein kvinna átt uttanfyri vanliga arbeiðstíð. Fyri at fáa størri nyttu burturúr teimum, hava vit tikið tær inn á føðideildina, so at tær kunnu taka lut í arbeiðnum, ístaðin fyri bara at sita fyri einki, tá ið tær skulu hava løn kortini.

– Tað, sum vit veruliga fáa nakað burturúr, er, at virksemi er í heilsuverkinum um dagin, so at sjúklingar kunnu koma hagar at fáa viðgerð.

– Hinvegin er støðan í tilbúgvingunum tann, at har situr heilsustarvsfólkið og bíðar eftir sjúklinginum, og tað allaroftast til onga nyttu, tí tíbetir hendir sjálvdan nakað.

Men tað hendir væl viðhvørt, at vanlukkur og ymiskt annað hendir uttanfyri arbeiðstíð og er tá ikki neyðugt at hava eina tilbúgving?

– Sjálvandi er tað neyðugt at hava eina tilbúgving, men vit eiga heilt avgjørt at taka spurningin upp til viðgerðar um, nær vit skulu hava eina tilbúgving og í hvønn mun vit skulu hava tilbúgvingar ymsasataðni, tí at hava tilbúgving í tann mun, vit hava tað nú, er ikki rationelt.

Jóhan Petur Davidsen sigur, at í hesum sambandi er tað ein spurningur um, hvussu nógv viðgerð skal fara fram lokalt.

– Kanska hevði tað verið betri at havt eina nógv minni tilbúgving í Klaksvík, so at sjúklingurin heldur kundi verðið sendur á Landssjúkrahúsið, har nógv tann størsta serfrøðin er og har tilbúgvinger kortini, sigur hann.

– Tað er í øllum førum ikki rationelt at hava fleiri sama slag tilbúgving ymsastaðni í landinum.

Kortini heldur hann, at støðan á Suðuroyar Sjúkrahúsi er eitt sindur øðrvísi, tí Suðuroy liggur hóast alt eitt sindur burturfrá landssjúkrahúsinum og tað er ikki altíð so lætt at sleppa til.

– Men nú undirsjóvartunnil verður gjørdur til Klaksvíkar, eigur hetta heilt avgjørt at verða ein spurningur, sum eigur at verða tikin upp til viðgerðar, heldur leiðandi yvirlæknin í Havn.

Hann vísir eisini á dømi um, at tað ber til at rationaliserað.

– À skurðdeildini á Landssjúkrahúsinum hava vit skorið seingjatalið niður í helvt hetta seinasta árið. Men við umleggingum og rationaliseringum er tað kortini eydnast at fáa sjey arbeiðsvikur afturat um árið.

Hann greiðir frá, at hesi seinastu 10-15 árini hava tey havt 16 lág-aktivitets vikur um árið við virksemið var bógv avmarkað fyri at kunna avgreiða avspákingar, frídagar, o.s.fr. – Hetta talið er nú skorið niður í 9 vikur um árið, hóast seingjatalið er munandi minkað og uttan spreingja játtanina.

– Eitt úrslit av hesum er, at nógvir bíðilistar eru munandi minkaðir. So tað er so nógv, sum ber til, tá ið allir starvsbólkar lyfta í felag, sigur Jóhan Petur Davidsen.

## Eingin trygd í lokalsjúkrahúsunum

Annars heldur Jóhan Petur Davidsen eisini, at leiklutturin hjá smáu sjúkrahúsunum eisini má verða tikin upp til viðgerðar

– Trygdin hjá sjúklingunum liggur fyrst og fremst í at starvsfólkið hevur útbúgving og royndir og at útbúgvingarnar verða hildnar viðlíka.

– Aðrastaðni verður mett, at tað skal eitt fólkagrundarlag uppá 250.000 fólk til, fyri at eitt Heilsuverk skal kunna veita eina dygdargóða tænastu.

Samstundis vísir hann á, at í Føroyum eru vit ikki meiri enn 50.000 fólk, og sostatt skuldu vit sum so ikki havt eitt sjálvstøðugt heilsuverk. Kortini liggja vit soleiðis fyri, at vit noyðast at fáa sum best burtur úr einum sjúkrahúsverki.

– Men hvussu hava politikarnir so loyst henda trupulleikan? Jú, tað hava teir gjørt við at taga eina eind, sum frammanundan er alt ov lítil, sundur í tríggjar minni eindir.

Hann spyr eisini, hví hetta er gjørt.

– Tað kann so ikki vera fyri at veita lokalu borgarunum tryggleika, tí tað er langt síðani staðfest í kanningum aðrastaðni, at tað er ongin trygd í smáum lokalsjúkrahúsunum.

– Ì Danmark verða tilbúgvingarnar á smáu sjúkrahúsunum niðurlagdar, tí kanningar vísa, at fyri sjúklingin er tað nógv størri trygd í at koma á eitt stórt sjúkrahús, har serfrøði av ymsum slagi er til staðar.

Hann vísir eisini á, at fleiri og fleiri sjúklingar og viðgerðir verða fluttar av smáu sjúkrahúsunum, til Landssjúkrahúsið og tað tyngir Landssjúkrahúsið, samstundis sum smáu sjúkrahúsini fáa betri umstøður at halda játtanirnar.

– Í hesum samanhangi er ótrúliga avgerðandi, at tann politiska skipanin vísir eitt trúvirði. Teir kunnu ákæra Landssjúkrahúsið fyri at hava brúkt ov nógvan pening, men tá virksemið flytir av hinum sjúkrahúsunum til Landssjúkrahúsið, má tað kosta fyri Landssjúkrahúsið, ímeðan hini sjúkrahúsini fáa luft í teirra játtanum.

Jóhan Petur Davidsen heldur, at skulu vit varðveita smáu sjúkrahúsini, eiga vit at brúka tey til ymisk endamál, sum ikki krevja so nógvar hjálpifunktiónir, sum eitt nú skurðviðgerðir krevja.

Hann nevnir, at eitt nú kundu smáu sjúkrahúsini verið brúkt til uppvenjingar tí tað krevur ikki so nógvar eyka hjálpifunktiónir.

## Fíggjarstýringin styrkjast

Annars er yvirlæknin samdur í, at tað er neyðugt at styrkja fíggjarstýringina á Landssjúkrahúsinum.

Deildin, sum tekur sær av fíggjarstýringini er ov veik. Avleiðingin av tí er, at meirnýtslur verða uppdagaðar ov seint í árinum og tí verða tey tiltøk, sum skulu til, fyri at fáa játtanina at halda, so ógvuslig, tí tað setur sína tí at leggja virksemi um.

Vóru meirnýtslurnar uppdagaðar fyrr í árini, hevði tað borið til at lagt umleggingarnar smidligari til rættis, so at tær merktust minni enn tær gera nú, sigur læknin.

Annars er fíggjarstýringin styrkt munandi seinastu árini, men tað skal altso meiri til, fyri at kunna stýra virkseminum so neyvt sum krevst.

Hinvegin heldur hann, at tað er ein stórur trupuleiki, at fyrisitingin er vorðin alt ov stór – og hon tykist ber at økjast.

– Ofta hevur ein varhugan av, at fyrisiting er blivin eitt endamál í sær sjálvum og bureaukratiið er stórt. Men hetta gerst ein stórur trupulleiki, tá ið tað fyrisitingarliga virksemi leggur hald á heilsustarvsfólk, so at orkan verður tikin frá heilsufremjandi arbeiðnum.